# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 70 ára føðingardagur



1. august fylti Helgir Thomsen í Hvalba 70 ár.

Helgir er hamarsmaður og hvalbingur við stórum H. Har er hann føddur og hevur búð alt sítt lív og báðar vegir er hann ættaður haðani.

Foreldrini vóru Anina og Júst. Tríggjar dagar eftir, at Helgir varð føddur, bleiv Júst 40 ár, og sostatt høvdu teir báðir hálvrundar og rundar føðingardagar somu ár, seinastu ferð tá Júst bleiv 85 og Helgir 45.

Í 1962 giftist Helgir við Ebbu og fingu tey børnini Andor, Øssur og Jónvør.

Í yngri døgum var hann til sjós, og í fleiri ár í Føroyingahavnini og róði út. Sum nógvir aðrir føroyingar hevði hann ikki sæð Føroyingahavnina aftur í mong ár, men hetta eydnaðist í fyrrárið, og varð tað ein stórhending fyri hann.

Men mest hevur hann gingið upp í kolaarbeiðið í Hvalba, og fyri hetta hevur hann eisini fingið heiðurstekin. Nógvum ferðafólkum hevur hann víst kolanámini, og spurdur hvussu hann kundi greiða frá á øllum hesum tungumálum, plagdi hann bara at siga, at tað gekk fínt, tí øll fóru væl nøgd avstaðaftur.

Seyð hevur hann eisini dámt væl at fingist við, men nú er minni av tí.

Helgir verður ynskt hjartaliga tillukku og alt tað besta framyvir.

Áki Ellendersen:

## Nýútlærdur blikksmiður




31. juli 2005 fekk Áki Ellendersen handað silvurheiðursmerki frá Dansk VVS fyri framúrskarandi úrslit sítt á útbúgvingini sum "VVS-, tag og facademontør" vanliga nevndur blikksmiðjur. Áki gjørdist sostatt bestur í árganginum hjá CEU-Kolding og fekk 11,15 miðal.

Áki hevur lært í 4 ár í blikksmiðjuni hjá Mariu Poulsen á Hálsi. Lærumeistari var Heri Petersen.

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

†

## Andlát og jarðarferðir

Anna Sofía Mouritsen, úr Sørvági, vanliga nevnd Diddan, andaðist á Ellisheiminum í Miðvági sunnudagin, 87 ára gomul.

*Kelda: Útvarpið*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæra mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara,

**Anna Sofía Mouritsen**
úr Sørvági, vanliga nevnd Diddan,

Andaðist á Ellisheiminum í Miðvági 31. juli, 87 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Kedron í Sørvági, hósdagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Tormóð**

*Tey ið vilja minnast Didduna kunnu lata eina gávu til Zarepta*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin